J.nr. LG 2008/208-216

# Frágreiðing

# um

# ognina matrikul nr. 126f, Klaksvík
# (húsið í Klaksvík til børn við autismu)

Latin

Løgtingsgrannskoðarunum

16. oktober 2009

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
"um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

Oktober 2009

# Innihaldsyvirlit

1 INNGANGUR 3

2 STUTT LÝSING AV MÁLINUM 4

3 NIÐURSTØÐA 8

4 ÚTREIÐSLUR SAMBÆRT LANDSROKNSKAPINUM 11

4.1 ÚTREIÐSLUR 2007 11
4.2 ÚTREIÐSLUR 2008 11

5 SPURNINGAR TIL LANDSSTÝRISMANNIN FRÁ LANDSGRANNSKOÐANINI 6. MAI 2009 12

6 SKJAL 1: TILMÆLI TIL LANDSSTÝRISMANNIN 18. MARS 2007 14

7 SKJAL 2: SKRIV FRÁ ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐNUM TIL LANDSVERK 27. JUNI 2007 16

8 SKJAL 3: FYRISPURNINGUR – LØGTINGSMÁL NR. S-77/2007 18

9 SKJAL 4: FRAGREIÐING FRÁ NÆRVERKINUM TIL ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ 5. MARS 2009 19

10 SKJAL 5: FRÁGREIÐING FRÁ ALMANNAMALARÁÐNUMN TIL LØGMANN 26. MARS 2009 28

11 SKJAL 6: FRÁGREIÐING FRÁ LANDSVERKI TIL ALMANNAMÁLARÁÐIÐ 19. MAI 2009 31

12 SKJAL 7: SKRIV FRÁ LANDSVERKI TIL INNLENDISMÁLARÁÐIÐ 14. JULI 2009 33

# 1 Inngangur

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av landsroknskapinum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." (grannskoðanarlógin).

Landsgrannskoðanin var á eftirlitsvitjan á matrikul nr. 126f og h í Klaksvík 30. apríl 2009 í sambandi við, at Almannamálaráðið í 2007 hevði keypt ein bygning í Klaksvík sum skuldi hýsa børnum við autismu. Bygningurin varð keyptur 18. juli 2007 og 30. apríl 2009 var hann enn ikki tikin í nýtslu.

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað málsgongdina og letur, sambært §12 í grannskoðanarlógini, við hesum løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um ognina matrikul nr. 126f, Klaksvík (húsið í Klaksvík til børn við autismu).

Sambært § 18 kunnu løgtingsgrannskoðararnir lata Løgtinginum frágreiðingina, sum sambært tingskipanini verður viðgjørd eftir § 80, stk. 2, sum skriv til Løgtingið.

Argir, 16. oktober 2009

Beinta Dam

# 2 Frágreiðing

## 2.1 Eftirlitið 30. apríl 2009

30. apríl 2009 vóru umboð frá Landsgrannskoðanini og hugdu at ognini á matrikul nr. 126f og h, Kelduskákið, Klaksvík.

Landsgrannskoðanin kundi staðfesta, at mestsum allir innveggir, loft, skilaveggir og køkur í erva vóru tiknir niður. Nakað av plátum vóru eftir á útveggjum og skilaveggjum. Plastdúkur (guvudúkur) var spentur undir bjálvingina á loftinum, tó ikki allastaðni. Á gólvinum í erva sóust merkir eftir lekum.

Innhurðar stóðu stáplaðar upp í kjallaranum. Hitablásari stóð í kjallaranum fyri at forða fyri fukti. Oljufýrið var sløkt. Køkselementir og hvítvørur sløddust í stóra rúminum í kjallaranum.

Bilhúsið (garagan) í erva var fult av tilfari, ið líktist niðurtøkuburturkasti. Í stóra bilhúsinum var ein rúgva av plattum, umframt leikur o.a.

Landsgrannskoðanin hevur síðani kannað málið gjøllari. Í juli 2009 varð ein fyribils frágreiðing latin løgtingsgrannskoðarunum. Frágreiðingin varð samstundis send Innlendismálaráðnum og Almannamálaráðnum til viðmerkingar.

Almannamálaráðið boðaði í juli 2009 frá, at tey ongar viðmerkingar høvdu. Innlendismálaráðið sendi í august 2009 viðmerkingar frá Landsverki.

Niðanfyri verður tikið samanum gongdina í málinum.

## 2.2 Stutt lýsing av málinum

Nærverkið hevur í eitt áramál leigað eini hús á Garðavegnum í Klaksvík til búpláss og umlætting hjá børnum við autismu. Klaksvíkar Kommuna eigur húsini.

### Tilmælið frá Almanna- og heilsumálaráðnum

Sambært einum tilmæli 18. mars 2007 frá umsitingni í Almanna- og heilsumálaráðnum til landsstýrismannin hava 5 børn við autismu verið til umlætting á Garðavegnum í Klaksvík síðani apríl 2003. Børnini koma úr øllum landinum.

Í tilmælinum stendur, at tørvurin á einum stovni til børn við autismu er stórur; 5 børn eru á bíðilista til búpláss, og 4 børn hava tørv á umlættingarplássi.

Kommunan hevur fleiri ferðir ætlað at sagt leigumálið upp. Húsini eru í ringum standi, og eru ikki hóskandi til bústovn.

Í tilmælinum verður eisini víst á, at Trivnaðartænastan í fleiri ár hevur leitað eftir hóskandi húsum í Klaksvík. Einasta brúkiliga tilboð, Trivnaðartænastan hevur fingið, er ognin matr.nr.126f í Klaksvik. Húsini eru 500 fermetrar til støddar, nýggj og ikki liðug innrættað. Tí er møguligt í stóran mun at laga húsini eftir tørvinum hjá børnunum við autismu.

### Kostnaðarætlan fyri leigumál

Ætlanin var í fyrstu atløgu, at Nærverkið skuldi leiga ognina. Í februar 2007 gjørdist tað Nærverkinum greitt, at ein upphædd á 2,1 mió. kr. skuldi setast av til liðugtgerð og umbygging, fyri at húsini kundu verða tikin í nýtslu. Eitt arkitektavirki hevði, eftir áheitan frá Nærverkinum, gjørt hesa kostnaðarmeting.

Landsverk sýnaði húsini og staðfesti kostnaðarmetingina, tó vórðu 200 t.kr. lagdar afturat til vegagerð og lyftu.

Í sambandi við leigumálið var samskifti millum Fíggjarmálaráðið og Almanna- og Heilsumálaráðið um, hvussu útreiðslurnar av leigumálinum skuldu verða hildnar.

Ætlanirnar at leiga húsini vórðu tó av ongun, tí semja fekst ikki um ein leiguprís, sum lá innanfyri tað, sum Landsverk kundi góðtaka.

**Mælt verður til keyp**

Mælt varð landsstýrismanninum til at keypa húsini og at flyta virksemið, sum var á Garðavegi, í keyptu húsini á Kelduskákinum. Sambært tilmælinum til landsstýrismannin vóru fyrimunirnir at keypa húsini, heldur enn framhaldandi at leiga:

- *at* húsini kundu verða innrættað eftir tørvinum,
- *at* húsini kundu hýsa bæði umlættingar- og bústovnatilboðum,
- *at* talan var um eina varandi loysn,
- *at* at talan, upp á longri sikt, var um eina bíligari loysn.

Avtala var gjørd um keyp av matr.nr. 126f og matr.nr. 126h í Klaksvík. Tó er tann treyt løgd við í §5, at keypsupphæddin er tikin við og samtykt við eykafíggjarlóg løgtingsins í mars 2007, og at Landsverk kann viðmæla keypið.

Í teldubrævi 14. mars 2007 frá Alfred Petersen, advokati, varð Landsverk biðið um at koma við møguligum viðmerkingum beinanvegin og annars at góðkenna avtaluna. Í teldubrævinum varð sagt, at *"tit øll kenna málið væl"*. Landsverk svaraði seinni sama dag, at Landsverk onga viðmerking hevði til keypið.

**Ognin verður keypt**

23. apríl 2007 tók landsstýrismaðurin undir við tilmælinum, og 12. juli 2007 keypti Almanna- og Heilsumálaráðið ognina fyri 5 mió.kr.

Játtanin varð fingin til vega í eykajáttanarlógini mars 2007-5, ið varð lýst 7. juni 2007.

Í viðmerkingunum til eykajáttanarlógina stendur m.a.:

> *"Landsstýrismaðurin er gjørdur varugur við, at tað er møguligt at ogna sær eini hús, sum eru egnað til endamálið, um nakrar broytingar verða gjørdar.*
>
> *Kostnaðurin av hesari ætlan er 7 mió. kr. íalt. Keypsprísurin er 5 mió.kr., og 2 mió.kr. skulu nýtast til at gera húsini klár, harav 1 mió.kr. í 2007 og 1 mió.kr. í 2008.*
>
> *Búøkið er umleið 500 fermetrar til støddar og kann hýsa 10 fólkum.*
>
> *Landsstýrismaðurin metir hetta vera eina betri loysn enn at fara út at leiga eini hús til endamálið, tí sum prísurin er á bústaðarmarknaðinum í løtuni, er talan um eitt gott keyp fyri ein rímiligan prís. "*

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina skuldu 2 mió.kr. nýtast til at gera húsini klár, 1 mió.kr. í 2007 og 1 mió.kr. í 2008.

Sambært Landsverki eigur Landsverk ongan lut í keypinum. Landsstýrismaðurin fekk ikki nakað tilmæli frá Landsverki um, at rætta loysnin var at keypa bygningin.

**Keypið verður avgreitt**

Í skrivi 27. juni 2007 til Landsverk boðaði Almanna- og Heilsumálaráðið frá, at keypsprísurin var 5 mió. kr. Landsverk varð biðið um at rinda advokatinum, sum

ráðsins vegna hevði tikið sær av málinum, keypsprísin og kostnaðin av keypinum. Tinglýsing fór fram 12. juli 2007.

Sambært Landsverki varð onki projekt gjørt út frá nýggju fortreytunum, og sostatt heldur eingin kostnaðarmeting. Tað tók drúgva tíð at avgreiða keypið, og tí varð onki meira gjørt við málið fyrr enn í september 2007.

Í september – desember 2007 vóru fleri fundir millum Nærverkið og Landsverk. Eisini sæst, at samskifti var við arkitektin.

**Arbeiðið verður seinkað**

Trupulleikar stungu seg upp á heysti 2007, tí fyrrverandi eigarin framvegis var í húsunum. Tað tykist, sum fyrrverandi eigarin ikki flutti úr húsunum fyrr enn í november 2007, tvs. 5-6 mánaðir eftir at húsini vóru keypt, og tingslýsing var farin fram.

Í desember 2007 vórðu gólvini tikin upp, og mestsum allir innveggir, loft, skilaveggir og køkur í erva vórðu tikin niður. Landsverk boðaði ikki Almanna- og Heilsumálaráðnum/Nærverkinum frá hesum arbeiði.

Sambært frágreiðing frá Landsverk til Innlendismálaráðið 14. juli 2009 vóru teir farnir í holt við at ríva niður, tí at liðið var so langt út á árið, áðrenn sleppast kundi framat bygninginum. Landsverk tók tað sum givið, at Nærverkið hevði konfirmerað tørv og krøv við Almannamálaráðið. Eftirfylgjandi kundi Landsverk staðfesta, at so var ikki.

**Kostnaðarmeting av umbygging og liðugtgerð**

Síðani tykist onki at vera hent í málinum fyrr enn í mars 2008. Tá fekk aðalráðið eina kostnaðarmeting frá Landsverki, ið vísti, at kostnaðurin at innrætta húsini fór at verða 6,3 mió.kr., t.v.s. nærum trífaldað ta upphædd, sum roknað varð við, tá húsini vórðu keypt. Landsverk segði, at av tí at talan var um varandi loysn heldur enn fyribils loysn – altso um keyp og ikki um leigu av húsunum – so vóru fortreytirnar broyttar.

Tað kom óvart á fyrisitingina í Almanna- og Heilsumálaráðnum, tí ráðið hevði ongar ábendingar fingið um, at talan fór at verða um hægri kostnað enn hann, ið fígging varð útvegað til við eykajáttan á vári 2007, og fyrisitingin í Almanna- og Heilsumálaráðnum hevði ilt við at skilja sjónarmiðið hjá Landsverki, tí annaðhvørt vóru hølini egnaði til virksemið ella vóru tey ikki, líkamikið hvørt talan var um at leigu ella keypa.

Sambært Landsverki gav tað onga meining at halda fast við upprunaligu lappaloysnuna, tá ið talan var um eina varandi loysn. Við at tillaga verkætlanina, fór landið at fáa meira fyri peningin. Eitt arkitektavirki hevði gjørt hesar tillagingar í samráði við Trivnaðartænastuna hjá Nærverkinum. Nýggja ætlanin var gjørd út frá nýggju fortreytunum, og tí kundi hon ikki teingjast saman við fyrru loysnini, sum var á góðar 2,3 mió. kr.

**Hildið verður fast um upprunaætlan**

Í apríl 2008 gjørdi Almanna- og Heilsumálaráðið Landsverki greitt, at støðan ikki var nøktandi, tí so lítil gongd var í málinum, og at framvegis skuldi arbeiðast eftir upprunaligu ætlanini, sum varð mett at kosta 2,3 mió. kr.

Tá fíggjarlógin fyri 2008 var samtykt, fekk Landsverk at vita frá Almannamálaráðnum, at hóast húsini vóru keypt, var hugburðurin um fyribils ábøtur ikki broyttur. Tað tók Landsverk til eftirtektar og fór í holt við at fremja ætlanina á hesum grundarlag.

**Naggatódn kemur í**

Sambært Landsverki vísti tað seg tó skjótt at vera sera torført at finna eina loysn innan fyri hesar karmar, sum í nóg stóran mun livdi upp til galdandi krøv, og tí dró málið út. Tó varð ein roynd gjørd at finna eina so bíliga loysn sum møguligt, men hon kom at kosta um 3,5 mió.kr., og Nærverkið var ikki nøkt við ta loysnina. Tí varð gingið burtur aftur frá hesari ætlan.

**Nærverk og Landsverk seta seg saman**

Í juli 2008 var fundur millum Nærverkið og Landsverk. Har varð avtalað at hava fund aftur í august 2008. Nærverkið hoyrdi tó onki aftur, og 1. september 2008 sóknast tey eftir fundi. Fundur bleiv avtalaður at vera 16. september 2008.

Niðurstøðan á fundinum 16. september 2008 var, at:

- ein bólkur, mannaður við umboðum frá Landsverki og Nærverkinum, skuldi verða settur at endurskoða umbyggingarkostnaðin,
- Landsverk skuldi vera høvuðsábyrgdari í bólkinum,
- bólkurin skuldi koma við einari endurskoðari kostnaðarætlan í seinsta lagi ein mánað seinni.

Tað gingu tveir mánaðir, uttan at Nærverkið frætti nakað aftur frá Landsverki. Nærverkið gav tá Almannamálaráðnum frágreiðing um málið, og segði sína hugsan um støðuna, eitt nú at Nærverkið ikki hevði gjørt annað enn at runnið aftan á málinum frá Hanusi til Janus. Nærverkið kundi ikki longur góðtaka bert at bíða og hyggja at, meðan onki hendi. Eisini gjørdi Nærverkið vart við, at hetta málið var vorðið eitt haft um beinini á Nærverkinum og Almannamálaráðnum, og at tað var stórur vandi fyri, at fór at gerast ein gøla.

Ímeðan hevði Trivnaðartænastan hjá Nærverkinum seinast í oktober 2008 hoyrt, at Landsverk hevði arbeitt við málinum einsamallur, uttan at boða Nærverkinum frá, sum annars varð avtalað á fundinum.

**Partarnir koma við endaligum tilmæli**

Í november 2008 var fundur millum Landsverk og Almannamálaráðið, har Landsverk legði fram eitt uppskot til møguliga loysn. Nærverkið hevði tó ikki verið við til at gera hesa loysnina, hóast avtaluna í september 2008. Niðurstøðan var, at Landsverk setti seg í samband við Nærverkið, og partarnir skuldu saman koma við einum endaligum tilmæli til Almannamálaráðið.

10. desember 2008 var arbeiðsbólkurin fyrstu ferð samlaður. Landsverk skuldi tá hava eina nýggja tekning klára. Men ongin tekning var klár, og 15. januar 2009 var heldur ongin tekning komin frá Landsverki.

Í desember 2008 tók Landsverk stig til, at ábøtur vórðu gjørdar á takið fyri 100 t.kr., tí tað lak illa, og ábøtur máttu gerast beinanvegin.

Sambært Nærverkinum vendi Almannamálaráðið sær fyrst í 2009 fleiri ferðir til Nærverkið fyri at vita, hvussu gekst við málinum. Nærverkið vendi sær síðani til Landsverk.

### Landsverk steðgar arbeiðnum við verkætlanini

Sambært Landsverki arbeiddi Landsverk ikki víðari við verkætlanini, tí at samsvar var ikki millum játtanina, og krøvini og tørvin frá Nærverkinum, og ongin kundi taka støðu til, hvat skuldi gerast.

### Endaligt tilmæli verður gjørt

Endaliga tilmælið frá Nærverkinum og Landsverki varð handað landsstýrismanninum í mars 2009, sum góðtók tað síðst í apríl 2009.

### Nýggj kostnaðarmeting

Sambært landsstýrismanninum vísir nýggj meting frá Landsverki, at umbyggingar-kostnaðurin fer at nærkast 5 mió. kr. Samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina, uttan innbúgv, verður nú nærum 11 mió. kr.

Sambært Landsverki hava tvær ymiskar loysnir verið inni í myndini, nevniliga

1. at leiga í avmarkað tíðarskeið við einari ávísari minimum umvæling: Metingin á 2,3 mió. kr. skal síggjast í ljósinum av hesum fortreytum.
2. Seinni varð húsið keypt, og stavar seinna kostnaðarmetingin frá tørvslýsingini hjá Nærverkinum, har atlit verða tikin til eina langtíðar- og varandi loysn.

Landsverk ger vart við, at tá talan er um slíka bygging, er vanligt, at $m^2$-prísurin er um 20.000 kr., og tað verður hann eisini við hesari loysnini. Landið hevur fingið ein bygning á 527 fermetrar fyri um 10,0 mió.kr., tá arbeiðið er liðugt.

Landsverk vísir á, at í baksýni, hevur tað mest ørkymlandi fyri Landsverk verið ábyrgdarbýtið millum Almannamálaráðið og Nærverkið, tí ikki bar til at gera nakað, sum var dýrari enn játtanin (Almannamálaráðið), og heldur ikki bar til at gera eina loysn, sum Nærverkið (serkunnleikin) ikki helt vera forsvarliga.

## 3 Niðurstøða

### Ábyrgdir og uppgávur til Landsverk

Sambært fráboðan nr. 12, frá 1. apríl 2004, "um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar" við seinni broytingum, sum var í gildi í 2007, hevði landsstýrismaðurin í vinnumálum heimild at geva fyrisitingarligu eindunum m.a. boð um:

a) Ný- og umbygging.
b) Viðlíkahald.
c) Leigumál og keyp av fastogn.
d) Viðgerð av studningsmálum viðvíkjandi fastogn.
e) Nýtslu av byggiráðgeving.

Í sambandi við nýggja málsøkjabýti er Landsverk nú stovnur undir Innlendismálaráðnum.

Landsstýrismaðurin læt Landsverki hesa uppgávu at umsita. Sambært heimasíðuni hjá Landsverki 4. desember 2006 er *"eitt nýtt málsøki skipað undir Vinnumálaráðnum undir heitinum byggi- og bygningaumsiting. Landsverk røkir hesa uppgávu og fær yvirskipaðu ábyrgdina av øllum landsins bygningum."*

Sambært heimasíðuni vóru m.a. hesar ásetingar galdandi, í sambandi við keyp av fastari ogn:

*"Einstaka ráðið metir sjálvt um hølistørv, og um hvørt talan skal vera um nýbygging, keyp ella leigu. Hetta skal vera gjørt í samráð við Landsverk – t. e. at stjóraráðini hava ráðføringarskyldu. Landsverk metir fyrst, um egnaði høli longu eru til taks millum almennu ognirnar, áðrenn avgerð um leigu, keyp ella bygging verður tikin. Í sambandi við nýbygging og umbyggingar skulu atlit frá byrjan verða tikin at vøkstri í dagligu nýtslumøguleikunum, rakstrarkostnaðinum og viðlíkahaldkostnaði."*

Harumframt var ásett:

*"Landsverk skal fráboðast og gera tilmæli um keyp ella sølu av ognum, eisini soleiðis at heildaryvirlitið yvir landsins bygningar kann dagførast."*

**Kostnaðarmeting í sambandi við leigumál**

Arkitektavirkið gjørdi eina kostnaðarmeting í sambandi við leigu av húsunum í Kelduskákinum. Landsverk staðfesti kostnaðarmetingina 16. februar 2007 við smærri broytingum.

Tað er av týdningi fyri málið, at sýnið, sum Landsverk gjørdi í hesum sambandi, ikki var sýn av húsunum til endaliga umbygging og liðugtgerð, men ein staðfesting av kostnaðarmetingini hjá arkitektunum at gera ávísar ábøtir, so bygningurin kundi gerast brúkiligur eitt avmarkað tíðarskeið í einum leigumáli.

Leigumálið varð tó av ongum, tí semja fekst ikki um leiguprís, sum lá innanfyri tað, sum Landsverk kundi góðtaka. Nærverkið helt tá, at hølistørvurin til búpláss og umlætting til børn við autismu kundi verða nøktaður við at keypa húsini á Kelduskákinum ístaðin fyri at leiga tey.

**Húsini verða keypt**

Málið fekk aðra vend, tá farið varð frá at leiga, til at keypa ognina. Almannamálaráðið læt 18. mars 2007 landsstýrismanninum tilmæli um at keypa húsini, sum í høvuðsheitum bygdi á tillmælið frá Nærverkinum 14. mars 2007.

Eftir øllum at døma, gav Almannamálaráðið sær ikki far um, at málið nú ikki var eitt leigumál, men eitt mál um at keypa fasta ogn, og Ráðið hevði skyldu til aftur at ráðføra seg við Landsverk, tí málið hevði broytt karakter.

Avtala var gjørd um keyp sum er treytað av, at keypsupphæddin er tikin við og samtykt við eykafíggjarlóg løgtingsins í mars 2007, og at Landsverk kann viðmæla keypið. Hendan avtala hevur óivað havt til endamáls, at tryggja at húsini ikki verða seld øðrum áðrenn keypsupphæddin er játtað av tinginum.

Landsverk fekk teldubræv frá advokatinum, sum avgreiddi keypið 14. mars 2007, har biðið varð um viðmerkingar til avtaluna um keypið. Landsverk svaraði sama dag, at Landsverk ongar viðmerkingar hevði til keypið.

Almanna- og heilsumálaráðið hevur kanska hildið, at Landsverk harvið tók undir við keypinum og teimum fíggjarligu avleiðingum, tað fekk fyri landskassan.

**Kostnaðarmeting fyri ligðugtgerð og umbygging**

Í mars 2008, sum keypið fór fram í juni 2007, kom Landsverk við einari dagførdari kostnaðarmeting á 6,3 mió.kr. fyri liðugtgerð og umbygging av húsunum. Hetta er nærum trífalt tann upphædd, sum ávísar ábøtur vóru mettar at kosta.

Hesar upplýsingar, um liðugtgerð og umbygging, vóru sambært málsgongdini ikki tøkar, tá avgerðin um at keypa húsini varð tikin, og málið varð lagt fyri Løgtingið til

støðutakan. Viðmerkingarnar til eykajáttanarlógina 2007-5, um kostnaðin fyri innrætting, eru tí ikki fullfíggjaðar.

Tað tykist, sum at fráveran av hesum rættiliga týdningarmiklu upplýsingum ger, at naggatódn kemur í málsgongdina, og málið tí kemur í drag.

Spurningurin er, um Landsverk í juni mánaða 2007 skuldi havt mótmælt og noktað at avgreitt keypið, vísandi til, at Landsverk sambært frammanundan nevndu ásetingum, skal fráboðast og hava gjørt tilmæli til m.a. keyp av ogn og vísandi til, at umbygging og liðugtgerð fór at kosta munandi meira, enn kostnaðurin av ávísum ábøtum.

**Mannagongdir hjá Landsverk**

Landsverk hevur hesar ásetingar um mannagongdir:

> *"Greiðar mannagongdir verða gjørdar fyri samskipan við brúkaran í innleiðandi tilgongdini, áðrenn gerð av byggiskrá fyri at tryggja, at servitanin á einstøku økjunum fær avgerandi ávirkan á kravsetanina."*

Greiðar mannagongdir tykjast ikki at hava verið gjørdar í hesum málinum.

**Viðmerkingar og tilmæli frá Landsgrannskoðanini**

Landsverk hevur ikki raðfest uppgávuna ovarlaga, og tað tykist, sum Landsverk bert samskiftir við Nærverkið, tá ið Nærverkið vendir sær til Landsverk fyri at vita, hvussu gongst við málinum.

Landsgrannskoðanin heldur, at arbeiðsgongdin í hesum máli hevur verið út av lagi vánalig, men kann, av góðum grundum, ikki taka dagar ímillum uppáhaldini hjá ávikavist Nærverkinum og Landsverk.

Tað tykist, sum tað hevur riggað óvanliga illa við trimum pørtum í málinum:

- Landsstýrismaðurin, við avgerðarrætti og fíggjarligari ábyrgd móvegis Løgtinginum,
- Nærverkið, við at gera tilmæli og lýsa tann sernámsfrøðiliga tørvin, og
- Landsverk, sum byggiharri og tekniskur ráðgevi.

Vánaliga arbeiðsgongdin er ein avleiðing av, at fyrireikingarnar til verkætlanina, tá farið varð undir at keypa, ikki hava verið nóg neyvar, og at tykist ikki sum nakað nærlagni hevur verið til at fremja verkætlanina undir givnum fortreytum. Verkætlanin fekk tí ikki neyðugu fíggingina.

Landsgrannskoðanin heldur, at landsstýrismaðurin í almannamálum hevur ikki útint sína eftirlitsskyldu á fullgóðan hátt, og hevur heldur ikki í nóg stóran mun virkað fyri einari loysn á málinum, men hevur lagt ábyrgdina fyri verkætlanina á Nærverkið.

Landsgrannskoðanin mælir til, at Innlendismálaráðið/Landsverk og Almannamálaráðið/Nærverkið í framtíðini gera greiðar mannagongdir fyri samskifti og ábyrgd í slíkum málum, soleiðis at syndarliga gongdin, í sambandi við ognina í Klaksvík, ikki endurtekur seg. Landsgrannskoðanin mælir somuleiðis til, at omanfyri nevndu mannagongdir verða latnar løgmanni og hinum landsstýrismonnunum, til tess at øll ráðini arbeiða eftir sama leisti.

# 4 Útreiðslur sambært landsroknskapinum

## 4.1 Útreiðslur 2007

Sambært Búskaparskipan Landsins eru um 370 t.kr. nýttar í 2007:

t.kr.

| Útreiðslur 2007 | Roknskapur |
|---|---|
| Sp/f Kanjon | 146.958 |
| Fuglø Arkitektar | 185.045 |
| Landsverk | 37.888 |
| **Tilsamans 2007** | **369.891** |

Landsverk og Sp/f Kanjon gjørdu í desember 2007 avtalu um hesi arbeiði:

- niðurtøka av innveggum, íroknað bjálvingartilfar,
- avtøka av innv. klæðing á útveggum (ikki bjálvingartilfar),
- niðurtøka av loftum íroknað bjálvingartilfar,
- gerð av dúrki í takrúmi við 12mm OBS-plátum 4-5 stk. plátur 1,22x2,44m til at leggja goymsluverða bjálvingartilfarið á,
- neyðuga og fakliga nøktandi tetting av lekum í tekju,
- niðurtøka av køki og tilhoyrandi hvítvørum, sum verður sett á goymslu í kjallara,
- gerð og fyrisiting av átroðkandi neyðugari avmontering av el- og hvs-innleggingunum í sambandi við timburarbeiðsfakliga niðurtøkuarbeiðið,
- uppseting av loftundirlagi við guvudúki,
- gerð av vindsperru omanfyri yvirsyllar millum sperrur har útveggirnar vera, har teir nú eru,
- upptøka og upprudding,
- burturveiting og avgreiðslu av niðurtøkuburturkasti.

## 4.2 Útreiðslur 2008

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 180 t.kr. nýttar í 2008:

t.kr.

| Útreiðslur 2008 | Roknskapur |
|---|---|
| Fuglø Arkitektar | 11.895 |
| P/F Føroya Hedda (gassolja) | 9.593 |
| Sp/f Inntakt, Tak og Membranálegging | 100.000 |
| Landsverk, lønir | 58.978 |
| **Tilsamans 2008** | **180.466** |

Í desember 2008 eru gjørdar ábøtur á takið fyri 100 t.kr., tí tað lak illa og ábøtur máttu fremjast beinanvegin.

# 5 Spurningar til landsstýrismannin frá Landsgrannskoðanini 6. mai 2009

6. mai 2009 setti Landsgrannskoðanin landsstýrismanninum nakrar spurningar. Landsstýrismaðurin svaraði 19. juni 2009.

Niðanfyri eru spurningarnir og svarini hjá landsstýrismanninum endurgivin.

**Spurningur:** Á hvørjum grundarlagi landsstýrismaðurin gjørdi av at keypa ognina

**Svar:** Grundarlagið undir keypinum er væl lýst í svari til fyrispurning til landsstýrismannin – Løgtingsmál S-77/2007. Landsstýriskvinnan hevur ikki meira at leggja afturat í hesum sambandi.

Landsstýrismaðurin vísir harafturat til fyrr umrødda tilmæli til landsstýrismannin frá 18. mars 2007 "um keyp av húsum í Klaksvík til autistar".

**Spurningur:** Heldur landsstýrismaðurin framvegis, at *"talan er um eitt gott keyp fyri ein rímiligan prís"*,

**Svar**: Eingin annar stovnur av hesum slag, er útvegaður tey síðstu árini, so ringt er at gera samanberingar um kostnað. Um talan er um eitt gott keyp fyri ein rímiligan prís, velst um, hvat samanborið verður við. Tað er ein sannroynd, at stovnstilboð kosta millum 1,0 til 1,5 mió. kr. pr. búfólk, í nøkrum førum yvir 2. mió. kr. pr. búfólk. Kostnaðurin fyri hendan stovnin, verður áleið 1,2 mió. kr. pr. búfólk.

**Spurningur:** Hví er einki hent viðvíkjandi innrætting av ognini, hóast landsstýrismaðurin í mai 2008 kunnaði Løgtingið um, at *"vissa er fingin fyri, at umvælingararbeiðið fer í gongd so skjótt, sum fíggjarlógin fyri 2008 er samtykt. Miðað verður ímóti at fáa húsini klár í hesum fíggjarárinum, men tað verður ikki roknað við, at húsini verða klár at taka í nýtslu fyrr enn í 1. ársfjórðingi í 2009"*,

**Svar**: Landsstýrismaðurin ásannar, at vissan um at umbyggingin fór at verða liðug og at ætlanin at fáa húsini klár í 2008, ikki hevur hildið.

Landsgrannskoðanini til kunningar, varð sagt, at fundur var millum Almannamálaráðið, Landsverk og Nærverkið um umbyggingina síðst í apríl 2008, har ráðið gav til kennar sína ónøgd við, at so lítil gongd hevur verið í málinum. Tá varð avtalað millum partarnar, at gongd má fáast á málið og at Nærverkið skuldi gera eitt tilmæli til Landsverk um møguligar loysnir. Tilmælið varð sent Landsverk fyrst í mai 2008.

Í september 2008 varð málið tikið upp aftur, tí tað framvegis ikki sá út til at nakað var hent í málinum. Avtalað verður millum partarnar, at Landsverk og Nærverkið í felag skulu koma við einum tilmæli til Almannamálaráðið.

Endaliga tilmælið frá Nærverkið og Landsverk varð handað í mars 2009, og er tað góðkent síðst í apríl av landsstýrismanninum.

**Spurningur:** Hvørjar ítøkiligar ætlanir eru um at innrætta ognina

**Svar**: Ein ítøkilig ætlan fyriliggur, sum Landsverk hevur latið úr hondum. Talan er um at innrætta húsini, har hæddin í erva verður nýtt til bústovn og hæddin í neðra verður

nýtt til umlætting. Í alt er talan um 9 pláss. Landsverk hevur upplýst, at um alt gongur sum ætlað, verður arbeiðið liðugt í hesum fíggjarári.

**Spurningur:** Fer kostnaðarmetingin, 2 mió.kr., at halda

**Svar**: Kostnaðarmetingin á 2 mió. kr. fer ikki at halda. Nýggj meting frá Landsverk vísir, at umbyggingarkostnaðurin fer at nærkast 5. mió. kr. Samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina, uttan innbúgv, verður nærum 11. mió. kr.

# 6 Skjal 1: Tilmæli til Landsstýrismannin 18. mars 2007

**Tilmæli til Landsstýrismannin um keyp av húsum í Klaksvík til autistar**

Síðan apríl 2003, hevur umlætting verið fyri 5 børnum við autismu á Garðavegnum í Klaksvik. Stovnurin hevur umlætting fyri børnum úr øllum landinum.

Eitt av hesum børnum fekk longu í august 2004 bráðfeingis tørv á búplássi og flutti tí inn á Garðavegnum. Sostatt hevur stovnurin veitt búpláss til eitt barn í skjótt trý ár. Hetta er ein kostnaðarmikil loysn.

Tørvurin á stovni til børn við autismu er stórur, og í løtuni eru 5 børn á bíðilista til búpláss og 4 børn hava tørv á umlættingarplássi. Tað snýr seg um børn úr øllum Føroyum.

Húsið á Garðavegnum er leigað frá Klaksvikar Kommunu, og kommunan hevur ofta ætlað at sagt leigumálið upp. Húsini eru í ringum standi, og eru ikki hóskandi til bústovn.

Børn, foreldur og stuðlar eru von við at ferðast til Klaksvíkar, og hava tey verið væl nøgd við umlættingina á Garðavegnum. Tá so er, og av tí at fakligi serkunnleikin, royndirnar og vitanin um autismu eru savnaðar í Klaksvik, metir Nærverkið, at tað er skilagott at finna eina loysn har.

Trivnaðartænastan hevur í fleiri ár leita eftir egnaðum húsum í Klaksvik. Einasta brúkiliga tilboð Trivnaðartænastan hevur fingið, eru ognin matr.nr.126f og 126h í Klaksvik, hjá Louis Poulsen og Ann-Mari Vernersdóttir. Húsini eru 500 $m^2$ til støddar, nýggj og ikki liðugt innrættað. Tí er møguligt í stóran mun at innrætta húsini eftir tørvinum hjá børnunum við autismu.

Landsstýrismaðurin hevur gjørt av at keypa húsini og er hædd tikin fyri hesum í eykajáttanarlógini í mars 2007, har 6 mió. kr. eru settar av til keyp og umvæling av ognini. Keypsprísurin er 5 mió. kr. og mettu umvælingarnar 2,3 mió. kr. Í inniverandi fíggjarári er sostatt peningur settur av til keyp og partvíst til umvæling av ognini, um eykajáttanin verður samtykt í verandi líki.

Nærverkið hevur boðað Almanna- og heilumálaráðnum frá, at rættast er at byrja við umlætting í ár og samstundis flyta virksemi úr Garðavegi inn í nýggja stovnin. Almanna- og heilsumálaráðið hevur fingið vissu fyri, at nýggj umlættingartilboð eisini verða sett í verk í ár. Peningurin er settur av á fíggjarlógini til hetta endamál.

Av tí at 1. mió. kr eru settar av til umbyggjan av húsinum í ár, verður ikki talan um, at stovnurin fer undir at veita bústovnatilboð her og nú. Peningur má tí setast av til umbyggjan í komandi fíggjarári við 1,3 mió. kr. til hetta endamál, so at fult virksemi (umlætting og bústovnatilboð) verður í bygninginum í leypi av 2008.

**Tilmæli:**
**Mælt verður landsstýrismanninum til at keypa húsini og at flyta virsemið á Garðavegi í Klaksvík í nýggja stovnin. Fyrimunurin við at flyta virksemið á Garðavegnum, heldur enn at leiga er,**

- **at húsini kunnu verða innrættað eftir tørvinum**
- **at húsini koma at hýsa bæði umlættingar- og bústovnatilboðum**
- **at talan verður um eina varandi loysn**

- **at talan upp á longri sikt er um eina bíligari loysn**

Kristjan Árnason (sign.)
ráðgevi

Góðkent: 19/4 - 2007 ______________________________
Turid Arge (sign.)
deildarstjóri

Góðkent: 20/4 - 2007 ______________________________
Poul Geert Hansen (sign.)
aðalstjóri

Góðkent: 23/4 - 2007 ______________________________
Hans Pauli Strøm (sign.)
landsstýrismaður

# 7 Skjal 2: Skriv frá Almanna- og Heilsumálaráðnum til Landsverk 27. juni 2007

Landsverk
Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78
110 Tórshavn

**Kunning um eykajáttanarløgtingslóg fyri mars 2007**

Sambært eykajáttanarlógini fyri mars 2007-5, ið Løgtingið hevur samtykt, er játtanin til niðanfyrinevndu høvuðskontu, sum tygum hava ræðisrætt á, broytt.

Høvuðskonta 8.21.6.02. Bústovnar o.a. Játtanin er hækkað við 6.000 tkr., soleiðis at samlaða játtanin fyri 2007 er 12.000 tkr.

./. Sí hjálagda avrit úr kunngerðablaðnum A 2007 hefti 12.

***8.21.6.02. Bústovnar o.a. (Løgujáttan)***
*Landsstýrismaðurin ætlar at keypa eini hús í Klaksvík, hvørs endamál verður at hýsa persónum við bústaðar- og umlættingartørvi. Tilboðið er fyri alt landið. Talan er ikki um eina nýggja ætlan, og peningur er settur av á fíggjarlógini til rakstur av virkseminum í inniverandi fíggjarári.*

*Í longri tíð hevur Nærverkið leitað eftir egnaðum hølum til endamálið, sum ætlanin var at leiga, men tað hevur verið torført at finna høli til tann leiguprís, sum teir almennu myndugleikarnir kunnu góðkenna.*

*Landsstýrismaðurin er gjørdur varugur við, at tað er møguligt at ogna sær eini hús, sum eru egnað til endamálið, um nakrar broytingar verða gjørdar. Kostnaðurin av hesi ætlan er 7 mió. kr. íalt. Keypsprísurin er 5 mió. kr., og 2 mió. kr. skulu nýtast til at gera húsini klár, harav 1 mió. kr. í 2007 og 1 mió. kr. í 2008. Búøkið er umleið 500 fermetrar til støddar og kann hýsa 10 fólkum.*

*Landsstýrismaðurin metir hetta vera eina betri loysn enn at fara út at leiga eini hús til endamálið, tí sum prísurin er á bústaðarmarknaðinum í løtuni, er talan um eitt gott keyp fyri ein rímiligan prís.*

*Søkt er um 6 mió. kr. til endamálið í 2007.*

*Sundurgreinað ætlan*

| Tús. kr. | J | EYJ | J+EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 6.000 | 6.000 | 12.000 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **10.** | **Bústovnar o.a.** | | | | |
| | **Útreiðslur** | | **6.000** | **6.000** | **12.000** |
| | 31. | Bygging og løguframleiðsla | 6.000 | 1.000 | 7.000 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 32. | Útvegan av løgu o.ø. | - | 5.000 | 5.000 |

Játtaðar eru 6 mió. kr. til keyp og umvæling av omanfyrinevndu ogn. Keypsprísurin er 5 mió. kr. Advokaturin Alfred Petersen, sum ráðsins vegna hevur tikið sær av málinum, skal hava kr. 50.000 í ómaksgjaldi og kr. 12.500 í mvg. Tinglýsingargjaldið er 0,5% av keypsprísinum ella kr. 25.000 + kr. 100 ella í alt 25.100. Avtalað er við Alfred Petersen, advokat, at keypsupphæddin og ómaksgjald v.m., verður flutt til hansara, og avgreiðir hann síðan málið.

Sostatt skulu flytast til Alfred Petersen, advokat, kr. 5.087.600.

Írestandi upphæddin kr. 912.400, skal nýtast til umvæling av ognini í inniverandi fíggjarári.

Vinarliga

Turid Arge (sign.)
deildarstjóri

# 8 Skjal 3: Fyrispurningur – Løgtingsmál nr. S-77/2007

Í fyrispurningi til landsstýrismannin – Løgtingsmál S-77/2007 – 7. mai 2008 varð m.a. spurt um, landsstýrismaðurin kann greiða frá ætlanini við at keypa sethús, ætlað autistum, og hvussu væl eydnað tann ætlanin er.

Landsstýrismaðurin svaraði soleiðis:

> *"Síðani 2003 hevur verið skipað fyri umlætting við Garðavegin í Klaksvík til 5 børn við autismu úr øllum landinum.*
>
> *Eitt av hesum børnum fekk í 2004 bráðfeingis tørv á búplássi og flutti tí inn á bústovnin á Garðavegnum at búgva. Hetta hevur verið ein sera kostnaðarmikil loysn fyri Nærverkið.*
>
> *Tørvurin á stovni til børn við autismu er stórur, og í løtuni eru 5 børn á bíðilista til búpláss, og 4 børn hava tørv á umlættingarplássi.*
>
> *Húsið á Garðavegnum er leigað frá Klaksvíkar kommunu. Kommunan hevur ofta borið uppá á mál at siga leigumálið upp. Húsini eru í ringum standi, og eru ikki mett hóskandi til bústovn.*
>
> *Børn, foreldur og stuðlar eru von við at ferðast til Klaksvíkar, og hava tey verið væl nøgd við umlættingartilboðið á Garðavegnum. Fakligi serkunnleikin innan Nærverkið hevur, við teimum royndum og vitan um autismu, mett, at skilabest er at finna onnur hóskandi hølir til endamálið í Klaksvík.*
>
> *Nærverkið hevur í fleiri ár sóknast eftir egnaðum hølum í Klaksvík. Einasta brúkiliga tilboðið, sum Nærverkið hevur fingið, er ognin, sum nú er keypt til endamálið. Húsini eru 500 fermetrar til støddar. Tey eru nýggj, og kjallarahæddin er ikki liðugt innrættað. Tí er í stóran mun møguleiki fyri at innrætta húsini samsvarandi tørvinum hjá børnum við autismu.*
>
> *Ætlanin var upprunaliga at leiga húsini; men leiguprísurin var so mikið høgur, at Landsverk ikki vildi góðtaka leiguprísin. Uppskotið til leigusáttmála legði upp til, at leigukostnaðurin fyri fermeturin var 950 kr. Landsverk segði í síni viðmerking til uppskotið til leigusáttmálan, at prísurin fyri bústovnar/sambýlir á bygd í mesta lagi eiga at liggja millum 350 – 650 kr. fermeturin. Hetta mátti landsstýrismaðurin taka til eftirtektar. Í sama viðfeingi upplýsti Landsverk, at um bygningurin varð bygdur í dag, hevði hann kostað 7 mió. kr. uttan mvg.*
>
> *Landsverk gjørdi tí eina støðulýsing av húsinum, sum vísti, at tað fer at kosta áleið 2,3 mió. kr. at gera húsini brúkilig til bústovn.*
>
> *Landsstýrismaðurin gjørdi tí av at fara í keypssamráðingar við ánaran av húsinum. Húsini vóru eftirfylgjandi keypt fyri 5. mió. kr.*
>
> *Í eykajáttanini í juni 2007 vórðu 6 mió. kr. fingnar til vega til endamálið, harav 5 mió. kr. til keyp og 1 mió. kr. til at umbyggja fyri. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2008 á kontu 8.21.6.02 Bústovnar (løgujáttan) eru avsettar 1,2 mió. kr. til endamálið. Landsstýrismaðurin má ásanna, at málið við umbyggingini ikki hevur gingið so væl, sum ætlanin var. Á fundi við Landsverk, Fuglø arkitektar, Nærverkið og Almanna- og Heilsumálaráðið hin 22. apríl 2008 er vissa fingin fyri, at umvælingararbeiðið fer í gongd so skjótt, sum fíggjarlógin fyri 2008 er samtykt. Miðað verður ímóti at fáa húsini klár í hesum fíggjarárinum, men tað verður ikki roknað við, at húsini verða klár at taka í nýtslu fyrr enn í 1. ársfjórðingi í 2009."*

# 9 Skjal 4: Fragreiðing frá Nærverkinum til Almanna- og Heilsumálaráðið 5. mars 2009

**Til Almannamálaráðið**

**Frágreiðing um málsgongdina viðv. autistahúsinum Kelduskákið í Klaksvík**

**Inngangur**

Almannamálaráðið hevur seinnapartin 3. mars 2009 heitt á Nærverkið um at gera frágreiðing um málsgongdina viðvíkjandi autistahúsinum í Klaksvík. Freistin var sett til 5. mars 2009 fyrrapart.

Nærverkið loyvir sær at viðmerkja, at freistin at gera frágreiðing er sera stutt, tá hugsað verður um, at tað er løgmaður, og harvið myndugleikin á hægsta stigi, ið skal hava hana. Nærverkið loyvir sær tí at taka fyrivarni í mun til stuttu tíðarfreistina, ið er givin at greiða frá málinum, ið er sera drúgt.

Hetta fyrivarni fyri stuttu tíðarfreistini at greiða frá málinum skal eisini síggjast í ljósinum av, at Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, í tíðindasendingi leygarkvøldið 28. februar 2009 **legði ábyrgdin fyri gongdina í málinum sera einvíst á Nærverkið. Vit taka hetta í størsta álvara og føla okkum illa viðfarin í sambandi við hesa útsøgnina,** tí tað gav eina langt ífrá rættvísandi mynd av gongdini í málinum og av, hvussu avgerðargongd og støðutakan er farin fram. Her verður eisini hugsað um, hvør ið hevur átt hvønn leiklut í málinum.

Nærverkið skal við hesum lýsa gongdina í málinum um autistahúsið Kelduskákið í Klaksvík. Frágeiðingin lýsir leiklutin hjá trimum pørtum í málinum, Almanna- og heilsumálaráðið, Landsverk og Nærverkið, soleiðis sum tað sæst í málinum hjá Nærverkinum.

Tað er neyðugt at halda sær fyri eyga formligu leiklutirnar hjá pørtunum, tá farið verður ígjøgnum hesa frágreiðing fyri at skilja, hvat í veruleikanum er farið fram.

Í sambandi við leigu av húsum, eru tað aðalráðið og Landsverk, ið skulu góðkenna og skriva undir leigusáttmála. Nærverkið leitar upp møguleikar. Aðalráðið góðkennir, um Nærverkið kann fara undir víðari samráðingar, men Nærverkið hevur ikki mandat at taka avgerð og onga heimild at skriva undir ein leigusáttmála.

Í sambandi við keyp av húsum er tað aðalráðið, sum tekur støðu til húsakeyp og sum er keypari og eigari av húsunum. Landsverk skal sýna og meta um ognina. Í hesum førum hevur tað verið Nærverkið, ið leitar upp møguleikar, men Nærverkið hevur ongar heimildir at taka avgerð ella keypa.

Aðalráðið fær á fíggjarlógini til vega játtan til íløgur. Landsverk umsitur íløgujáttanina og hevur ábyrgdina fyri umbyggingum og umvælingum á økinum.

Nærverkið lýsir og ráðgevur um sernámsfrøðiliga tørvin og kann gera tilráðingar og tilmæli, soleiðis at karmarnir um virksemið verða so nøktandi sum gjørligt. Nærverkið hevur ikki avgerðarrætt og ongar heimildir at halda útreiðslur í hesum førum. Ta heimildina hevur Landsverk.

**Leigumál**
Forsøgan er í stuttum tann, at Nærverkið í nøkur ár hevur leigað eini hús frá Klaksvíkar kommunu primært til umlætting hjá fólki við autismu. Húsini, sum eru í ringum standi, verða vanliga nevnd Fjálgalon og liggja við Garðavegin.

Klaksvíkar kommuna hevur fleiri ferðir ynskt at siga leigusáttmálan upp, tí kommunan hevur ætlanir um at selja húsini. Í oktober 2008 segði kommunan so upp leigumálið.

Av hesi orsøk hevur verið neyðugt hjá Nærverkinum at fáa eini onnur hús til virksemið, hetta saman við tí sannroynd, at neyðugt var at økja um tilboðið til autistar bæði til búpláss og umlætting, tí tørvurin var vaksandi.

Í 2006 leitaði Nærverkið eftir egnaðum húsum til leigu. Í tveimum førum eydnaðist at fáa samband við áhugaðar húsaeigarar, men tá komið var til samráðingar um leigumál, vildu eigararnir heldur selja. Møguleikin fyri at keypa hús var ikki til staðar. Húsini gloppu Nærverkinum av hondum, og hildið var tí áfram at leita eftir egnaðum húsum til leigu.

Ultimo 2006 fann meklaravirkið Inni eini stór, ikki liðugtgjørd sethús í Klaksvík, ið kundu koma upp á tal at leiga, og samband fekst við útleigaran.

Primo januar 2007 byrjar Nærverkið at nærkast málinum og nakað av umrøðu er við Almanna- og heilsumálaráðið um møguleikarnar fyri leigumálinum. Tað er ringt at fáa nakað greitt útspæl frá útleigaranum.

1. feburar 2007 er tað greitt, at ein upphædd á 2,1 mió. kr. skal setast av til liðugtgerð og umbygging fyri at kunna taka húsini í nýtslu. Fuglø Arkitektar høvdu, eftir áheitan frá Nærverkinum, gjørt hesa kostnaðarmeting. (Sí teldupost til AHR (Poul Geert Hansen) 1. februar 2007

1. februar 2007 biður Landsstýrimaðurin um at fáa upplýsingar beinanvegin, um møguleiki er fyri leigumálinum, so støða kann takast.

6. februar 2007 svarar Nærverkið landsstýrismanninum, at eigarin er sinnaður at samráðast um eitt langtíðarleigumál 6-10 ár. Somuleiðis sigur Nærverkið, at tað fer at heita á Landsverk um at koma á banan viðvíkjandi góðkenning av leigusáttmála. Hetta so Landsverk kann vera inni í málinum beinanvegin, so arbeiðið við at fáa leigumálið upp á pláss kann ganga skjótt.

8. februar 2007 kunnar Nærverkið Almanna- og heilsumálaráðið um, at Nærverkið hevur heitt á advokat um at hjálpa við samráðingunum um møgulig leigu, tíðarskeið og prís. Í hesum telduposti sigur Nærverkið, at málið stendur og fellur við spurninginum, um íløguupphæddin kann reisast antin av eigaranum ella Almanna- og heilsumálaráðnum. Eisini kunnaði Nærverkið um, at avtala varð fingin í lag við Landsverk um at fylgja málinum frá byrjan av.

Tað gekk heldur striltið við at koma veruliga á tal við eigaran av húsunum, tá tað snúi seg um realitetirnar. Tí bað Nærverkið um, at eigarin eisini fekk sær ein advokat, so veruligt glið kundi koma á málið. Hetta varð gjørt.

9. februar 2007 var fundur við Almanna- og heilsumálaráðið, har tað verður tilskilað, at Almanna- og heilsumálaráðið ynskir, at Nærverkið heldur áfram við uppgávuni um at leiga hesi húsini í Klaksvík. Sama dag fara boð til Landsverk um, at teir kundu fara inn í málið skjótast gjørligt.

Tann 16. februar 2007 var ein persónur frá Landsverk og sýnaði húsini og gjørdi niðurstøðu og kom við eini kostnaðarmeting, ið tá var 2,3 mió. kr. (inkl. lyft) til liðugtgerð og umbygging.

Í tíðarskeiðinum fram til 14. mars verður samráðst um eitt langtíðarleigumál. Tá fær málið eina aðra vend og keyp kemur upp á tal ístaðin.

**Keyp av húsinum**
Í málinum hjá Nærverkinum liggur eitt tilmæli frá Nærverkinum frá 14. mars 2007, har tað verður mælt til at keypa húsini ístaðin. Ì Nærverkinum liggja ikki onnur skjøl hesum viðvíkjandi, heldur ikki um sjálva samráðingartilgongdina fundir v.m., ið føra fram til grundgevingarnar, sum vóru at:

- húsini kunnu verða innrættað eftir tørvinum
- talan er um eina varandi loysn
- talan er upp á longri sikt um eina bíligari loysn

Her hava helst verið fundir partanna ímillum, sum geva ábendingar um hesa tilgongdina, og sum Almanna- og heilsumálaráðið helst hevur upplýsingar um. Tí tað var Almanna- og heilsumálaráðið, sum skuldi keypa húsini, og Landsverk, hvørs serfrøðingar kendu húsini væl, ið skuldu meta um, um tað var skilabetri og bíligari at keypa ístaðin fyri at leiga, og um ognin var verd keypsprísin.

24. apríl 2007 boðar Almanna- og heilsumálaráðið í skrivi Nærverkinum frá, at landsstýrismaðurin hevur tikið undir við ætlanunum um at keypa húsini, treytað av at eykajáttan frá mars 2007 fekst í verandi líki. Samstundis varð boðað frá, at biðið var um eykajáttan á 1,0 mió. kr. í 2007 til umbygging/innrætting av øllum húsunum, og at tað verður neyðugt at søkja um tær írestandi 1,3 mió. kr. til fíggjarlógina 2008. Soleiðis fer málið til Fíggjarmálaráðið, fíggjarnevndina og Løgtingið, ið sostatt samtykkir eykajáttan til keypið og part av umbyggingini.

Í tíðindasendingin leygarkvøldið 28. februar 2009 segði Hans Pauli Strøm, landstýrismaður, at hann hevði tikið avgerð um húsakeypið eftir tilmæli frá Nærverkinum. Tað er rætt, at Nærverkið hevur gjørt eitt tilmælið til Almanna- og heilsumálaráðið um keyp av húsunum. Nærverkið ger ikki tilmælið til sjálvan landsstýrismannin, tað er uppgávan hjá aðalráðnum. Sum skilst hava tað verið fundnir partanna millum í Almanna- og heilsumálaráðnum frammanundan, at keypsavtalað varð gjørd. Nærverkið gongur út frá, Almanna- og heilsumálaráðið, sum keypari, hevur tryggjað sær, at keypupphæddin var rímilig í mun til marknaðarprísin, og at Landsverk hevur mett um virðið á ognini og gjørt sítt tilmælið til aðalráðið hesum viðvíkjandi sum byggiserkønur myndugleiki.

Eykajáttanin varð samtykt 1. juni 2007. Tann 22. juni 2007 spyr Nærverkið Almanna- og heilsumálaráðið, hvussu tað gongur við málinum um húsakeyp í Klaksvík.

2. juli 2007 fær Nærverkið á fundi millum Almanna- og heilsumálaráðið, Landsverk og Nærverkið avrit av einum skrivi frá Almanna- og heilsumálaráðnum til Landsverk dagfest 27. juni 2007, har Landsverk verður kunnað um eykajáttanina, og tilskilað verður, hvussu upphæddirnar til keypið og umvælingina skulu nýtast, og harvið fær Landsverk málið at avgreiða.

Eisini vóru boð komin frá advokatinum hjá Almanna- og heilsumálaráðnum, at tað skuldi ganga skjótt at avgreiða keypið fyri at náa at fáa húsini tinglýst, áðrenn bæði advokatarnir og tinglýsingin fóru í summarfrí.

**Umbygging**
Summarið 2007 gongur, og Nærverkið hoyrir onki aftur um húsakeypið. Nærverkið spyr tí mánaðarskiftið august/september 2007 advokatin hjá Almanna- og heilsumálaráðnum, hvussu vorðið er. Hann greiðir frá, at húsakeypið varð tinglýst 12. juli 2007, og at Almanna- og heilsumálaráðið hevði fingið skjølini 7. august 2007.

5. september 2007 vendir Nærverkið sær sostatt til Almanna- og heilsumálaráðið fyri at vita, hvussu gongur við málinum. Av tí at onki hoyrdist frá Landsverk, ið skuldi standa fyri umbyggingini, varð eisini spurt um, hvussu farast skuldi í gongd við umbyggingina, og um hon fór at verða framd í 2007.

Svar kemur frá Almanna- og heilsumálaráðnum beinanvegin, har víst verður til skrivini til Landsverk í juni. Nærverkið boðar Almanna- og heilsumálaráðnum frá, at Nærverkið fer at seta seg í samband við Landsverk beinanvegin.

Stjórin í Nærverkinum heitir á Trivnaðartænastuna um at seta seg í samband við Landsverk skjótast gjørligt.

26. september 2007 er fundur millum Trivnaðartænastuna í Nærverkinum og Landsverk, har m.a. kostnaðarmetingin hjá Fuglø Arkitektum verður umrødd. Avtalað varð á tí fundinum, at samband skuldi verða millum Landsverk og Trivnaðartænastuna fyri at fáa neyðugu arbeiðini framd sum skjótast.

2. oktober 2007 er avtalaður fundur millum Landsverk, Trivnaðartænastuna og Fuglø Arkitektar.

Landsverk skuldi nú fara at hyggja eftir húsunum. Men av tí at hvørki Landsverk ella Nærverkið høvdu nøkur skjøl, ið skjalprógvaðu keypið, m.a. tinglýsingarbrævið og skeytið, var farið at leita eftir tí í Almanna- og heilsumálaráðnum. Hetta var neyðugt fyri at kunna fara inn í húsini. Hesi vóru fingin til vega úr Almanna- og heilsumálaráðnum tann 8. oktober 2007.

Í tí sambandi fær Nærverkið 11. oktober 2007 boð frá leiðaranum fyri autistatilboðið í Klaksvík, ið skal umsita Kelduskákið, at eigarin framvegis býr í húsunum, sum hann hevði selt fleiri mánaðir frammanundan. Frágreiðing hansara varð, at advokatur hansara skuldi hava rátt honum til at blíva í húsunum, inntil hann fekk onnur boð frá nýggja eigaranum.

Av tí at Almanna- og heilsumálaráðið er formligi eigarin av húsunum, heitir Nærverkið tí á Almanna- og heilsumálaráðið um at taka neyðug stig at fáa fyrrverandi eigaran út úr húsunum. Tað gongur striltið at fáa fyrrverandi eigaran út, og tað endar við, at advokatar á báðum síðum koma upp í málið.

Tann 30. oktober 2007 boðar Almanna- og heilsumálaráðið Nærverkinum frá, at advokaturin hevur váttað, at fyrrverandi eigarin er fluttur úr húsunum.

31. oktober 2007 boðar Nærverkið Almanna- og heilsumálaráðnum frá, at fólk hava verið í húsunum aftur. Heitt verður á eigaran, Almanna- og heilsumálaráðið, um at taka stig til at skifta lásini og sýna húsini aftur fyri at staðfesta, um ognin er í tí standi, hon var, tá húsini blivu keypt.

1. november 2007 heitir Almanna- og heilsumálaráðið á Nærverkið um at skifta lásini út. Samstundis leggur Almanna- og heilsumálaráðið Nærverkinum eina við - og ikki Landsverk, sum annars hevur ábyrgdina fyri umbyggingunum - at umvælingarnar mugu fara í gongd beinanvegin, tí tað er komið so langt út á árið.

Fyrrverandi eigarin er tó framvegis í húsunum, og 5. november 2007 boðar Almanna- og heilsumálaráðið Nærverkinum frá, at avrátt er við advokatin, hvussu farast skal fram víðari við at fáa fyrrverandi eigarin út.

Í tíðarskeiðinum primo november 2007 til primo desember 2007 verður arbeitt við at gera uppskot til innrætting. Nakað av umrøðu og iva stendst av kostnaðarmetingini.

Fuglø Arkitektar teknað og Trivnaðartænastan, sum skal brúka húsini, ráðgevur um tørvin eftir avtalu við Landsverk, ið hevur umbyggingina um hendi, t.v.s. ræði á játtanini og heimild at taka avgerð.

Í november 2007 metir leiðarin fyri Trivnaðartænastuna, at tað er neyðugt at fáa stjóran á Landsverk upp í málið og ringir tí til stjóran hesum viðvíkjandi.

Umboðið frá Landsverk boðar 26. november 2007 Fuglø Arkitektum frá, at hann ikki longur hevur við sakina at gera. Hann bíðar eftir nærri boðum frá leiðsluni (á Landsverk). Sama dag kunnar Fuglø Arkitektar Nærverkið um, at málið nú liggur einastaðni millum ”Heródes og Pilatus”. T.v.s. at her fer málið onkursvegna á glið. Onki liggur í málinum hjá Nærverkinum, sum vísir, hvat tað er, sum hendir á Landsverk.

3. desember 2007 er fundur í Nærverkinum við Landsverk, har m.a. stjórin á Landsverk og ein deildarleiðari eisini luttaka. Eingin fundarfrásøgn fyriliggur her. Tó skal stutt greiðast frá høvuðsevnunum á fundinum.

Stjórin á Landsverk kunnar seg á hesum fundi um málið og tilskilar yvir fyri Nærverkinum nýggju mannagongdirnar, ið eru, at Landsverk nú hevur ábyrgdina av og tekur sær av slíkum málum sum hesum. Stjórin í Nærverkinum vísir á hesum fundi umboðunum frá Landsverk brævið frá 27. juni 2007, har tað longu er tilskilað, at tað er Landsverk, sum eigur málið. So partarnir eru ikki ósamdir um tað. Nærverkið hevur verið kunnað um leiklutin hjá Landsverk frá fyrsta degi av.

Eisini førdi Landsverk fram á fundinum, at Nærverkið ikki hevði heimild at avhalda útreiðslur í samband við hetta málið. Nærverkið kundi av somu orsøk eisini vísa á, at Nærverkið ikki hevði kontraherað, tí heimildarskipanin ikki loyvdi tí. Men Trivnaðartænastan hevði, eftir ynski frá Landsverk, verið uppi í arbeiðinum at ráðgeva um innrættingina, sum Fuglø Arkitektar høvdu gjørt uppskot til. Landsverk hevði goldið rokningarnar fyri tað arbeiðið, sum rætt var, tí tað var umbiðið av Landsverk, sum hevði ábyrgdina av málinum.Tað sum víðari skuldi henda, skuldi stjórin á Landsverk taka sær av.

Tað liggur ikki meira í málinum hjá Nærverkinum fyrr enn í mai 2008. Hetta tí val verður útskrivað, og eingin fíggjarlóg er í fyrru helvt av 2008 og tískil ongir pengar at arbeiða við.

Á vári 2008 ótolnast Almanna- og heilsumálaráðið og spyr, hvat hendir í málinum. Tá hevur aðalráðið fingið eina kostnaðarmeting, ið vísir, at upphæddin til innrætting av eini varandi loysn er uml. 6,0 mió. kr. t.v.s. nærum trífaldað ta

upphædd, sum roknað varð við, tá húsini vóru keypt. Upprunaliga kostnaðarmetingin bygdi á eina fyribilsloysn og leigumál. Samstundis kemur undan kavi, at eitt ávíst arbeiði er gjørt inni í húsunum í desember 2007, har m.a. gólvini vóru tikin upp. Hetta var gjørt eftir innrættingaruppskotinum til ta dýraru loysnina. Landsverk hevði staðið fyri hesum, men hevði ikki tryggjað sær, at játtandi myndugleikin, t.v.s. Almanna- og heilsumálaráðið, tók undir við tí seinnu og dýraru loysnini.

Hetta gav trupulleikar, og 22. apríl 2008 kallaði aðalstjórin í Almanna- og heilsumálaráðnum Landsverk og Nærverkið inn til fund at tosa um støðuna. Tað var greitt á fundinum, at Almanna-og heilsumálaráðið ikki helt, at støðan var nøktandi, tí so lítið hendi. Tað var enn upp á tal við eini upphædd upp á 2,3 mió. kr. til umbygging. Hetta gav serliga trupulleikar í mun til, at gólvini nú vóru tikin upp og bygningurin tí forverraður í mun til upprunastandin og møguleikan at fáa ta ódýraru loysnina upp á 2,3 mió. framda. Tað kom at dýrka ætlanina, at hetta var hent. Umrøddar vóru ymiskar loysnir og niðurstøðan gjørdist, at Nærverkið skuldi gera eitt tilmæli til Landsverk.

Eisini komu boð frá leiðaranum í Klaksvík, at takið lak, og hon hevði verið inni og sett spannir ymsa staðni fyri at byrgja fyri vatnskaðum. Í sýnisfrágreiðingini hjá Landsverk frá 16. februar 2007 sæst onki um standin á takinum, og at tað her eru brek, sum eiga at verða bøtt.

7. mai 2008 sendir Nærverkið eitt tilmæli til Landsverk við avriti til Almanna- og heilsumálaráðið. Í skrivinum verður greitt frá, hvussu gongdin fer frá at vera ein fyribilsloysn til eina varandi loysn, og hvat tað merkir í mun til upphæddina, ið er avsett til umbyggingar. Nakrar mánaðir seinni ringir eitt starvsfólk frá Landsverk, ið var við á fundinum 22. apríl 2008, og sóknast eftir tilmælinum. Hann hevði ikki sæð, at tað var komið til Landsverk fyri langari tíð síðani. Nærverkið sendi so tilmælið til Landsverk av nýggjum. Tilmælið hjá Nærverkinum, sum nú er nærum eitt ára gamalt, fekk onga viðgerð, og ongin tók støðu til tað. Hvørki á Landsverk ella í Almanna- og heilsumálaráðnum.

15. juli 2008 er fundur millum Nærverkið og Landsverk um húsini í Klaksvík. Avgjørt varð, at Landsverk skuldi skipa fyri fundi aftur í august 2008, og roynt varð at fáa Almanna- og heilsumálráðið við á fundin. Nærverkið hoyrdi onki aftur frá Landsverk og rykti eftir fundi 1. september 2008. 2. september 2008 svarar Landsverk, at teir skjóta upp, at Nærverkið innkallar til fund skjótast tilber. Nærverkið játtar at taka sær av tí, tí tíðin gongur undan, hóast avtalan var, at Landsverk skuldi taka hetta stigið. Almanna- og heilsumálaráðið hevði tá aftur rykt munnliga, og aðalstjórin hevði sagt við stjóran í Nærverkinum, at tað er 2,3 mió. kr., sum er upp á tal, og ikki 6,0 mió. kr. Tað er bert neyðugt at fáa eini greið boð frá Almanna- og heilsumálaráðnum til partarnar um hetta, so farast kann í gongd.

Tað eydnast at fáa Landsverk á fund tann 16. september 2008. Niðurstøðan á tí fundinum er at:

- Ein bólkur mannaður við umboðum frá Landsverk og Nærverkinum verður settur at endurskoða umbyggingarkostnaðin
- Landsverk verður høvuðsábyrgdari í bólkinum
- Bólkurin skal koma við eini endurskoðari kostnaðarætlan í seinsta lagi um ein mánað.

Landsverk upplýsir á fundinum, at umbyggingin kann taka upp til eitt ár frá tí, at farið verður í gongd til húsið stendur liðugt.

Tað ganga tveir mánaðir, og Nærverkið frættir onki aftur frá Landsverk, sum er høvuðsábyrgdari í málinum. Nærverkið gevur tá Almannamálaráðnum eina frágreiðing um málið og sigur sína hugsan um støðuna, eitt nú at Nærverkið ikki hevur gjørt annað enn at runnið aftan á málinum frá Peri til Pól, og at onki hendir. Nærverkið kann ikki longur greiða frá, hví so er, tí ábyrgdin fyri gongdini liggur og hevur ligið hjá Landsverk. Nærverkið kann tó ikki longur góðtaka bert at bíða og síggja til, at onki hendir. Eisini ger Nærverkið vart við, at hetta málið er vorðið eitt haft um beinini hjá Nærverkinum og Almannamálaráðnum, og at tað er stórur vandi fyri, at hetta gerst ein gøla.

Nærverkið leggur upp til, at Almannamálaráðið tosar við Landsverk um, hvat teir ætla.

19. november 2008 setir Almannamálaráðið seg í samband við Landsverk.

6. november 2008 hevur ein fundur verið millum Landsverk og Almannamálaráðið, har Landsverk hevði lagt fram eitt uppskot til møguliga loysn, sum Nærverkið tó ikki hevði verið við til at gera, sum tað annars varð avtalað 16. september 2008. Niðurstøðan, sum framgongur av fundarfrásøgnini, er, at Landsverk setir seg í samband við Nærverkið, og skulu partarnir samlað koma við einum endaligum tilmæli til Almannamálaráðið.

Ímeðan hevur Trivnaðartænastan ultimo oktober 2008 hoyrt, at Landsverk hevur arbeitt við málinum einsamallir, uttan at boða Nærverkinum frá, sum annars varð álagt av Almannamálaráðnum.

10. desember 2008 var arbeiðsbólkurin fyrstu ferð samlaður. Landsverk skuldi tá hava eina nýggja tekning klára. Men ongin tekning var klár tá, og 15. januar 2009 var ongin tekning komin frá Landsverk.

Leiðarin fyri Trivnaðartænastuna greiðir 15. januar 2009 Almannamálaráðnum frá, at Trivnaðartænastan setti seg í samband við Landsverk beinanvegin og gjørdi vart við, at hon ikki kundi góðtaka eina tekning, sum hon bert hevði hoyrt um. Hetta snúi seg serliga um baðirúmsfasilitetir, og at tað fekst so lítið burtur úr húsunum, so tilboðið til autistar kom at tódna. Tað kundi Nærverkið ikki mæla til. Trivnaðartænastan lovar Almannamálaráðnum, at Nærverkið fer at hanga í málinum.

Men nú fær málið av einhvørji orsøk nýggja vend. Tann 22. januar 2009 fær Nærverkið fyrispurning frá Almannamálaráðnum, har landsstýriskvinnan vil hava at vita heilt konkret, um Nærverkið og Landsverk í felag hava gjørt av, at alt skal takast niður í húsinum í Klaksvík, ella um hetta er ein avgerð, sum Landsverk hevur tikið einsmalt.

22. januar 2009 svarar Nærverkið, at Landsverk hevur ræði á kontuni, og tað er bert Landsverk, ið kann taka avgerðir um arbeiði. Tað er staðfest í upprunaliga skrivinum til Landsverk eftir húsakeypið, at Landsverk hevur ábyrgdina fyri umbyggingunum. Tí kann ongin felags avgerð fyriligga. Tað er Landsverk eina, ið hevur tær heimildirnar. Hetta hevur Landsverk eisini víst Nærverkinum á í sambandi við hetta málið.

Somuleiðis vísti Nærverkið yvirfyri Almannamálaráðnum á teldupostsamskiftið frá 18. desember 2008 um sama, har tilskilað varð, at Fuglø Arkitekter høvdu fortalt leiðaranum í Klaksvík:

*“at Landsverk hevur sett í verk niðurríving, og Jákup Pauli væntaði, at tað arbeiðið skal byrja í dag. Hetta er av játtan, sum er sett av til í ár, og sum eg skilti, var tekningin góðkend av Landsverk”.*

30. januar 2009 var fundur millum landsstýriskvinnuna við Almannamálum, landsstýriskvinnuna við Innlendismálum, Landsverk og Nærverkið um gongdina í málinum.

Niðurstøðan varð, at farast skuldi aftur til upprunauppskotið til varandi loysn hjá Fuglø Arkitektum, og arbeiðsbólkurin skuldi gera eitt samlað tilmæli til Almannamálaráðið hesum viðvíkjandi.

Tað sum farið er av inniverandi ári hevur Almannamálaráðið fleiri ferðir vent sær til Nærverkið fyri at vita, hvussu tað gongur í málinum, hóast tað er Landsverk, sum hevur ábyrgd av gongdini, og fyrispurningurin tí átti at verið vendur hagar. Nærverkið hevur so aftur rykt Landsverk, sum situr við uppgávuni. Seinasta útspælið er eitt uppskot frá Landsverk dagfest 2. mars 2009 til innrætting. Kostnaðarmeting og tíðarætlan, sum er tað, sum Landsverk serliga hevur serkunnleika til, fylgir ikki við, so enn er onki liðugt til støðutakan.

**Viðmerkingar**

Hóast Nærverkið ongar heimildir hevur at taka avgerðir ella játtan at avhalda útreiðslur fyri, hevur Nærverkið stillað upp til tað mesta í hesi tilgongdini og víst ábyrgd í mun til at fáa tilboðið til autistar í gongd.

Nærverkið hevur við sínum leikluti, sum tann, ið skal lýsa tann sernámsfrøðiliga tørvin, verið við til at gera tilmælir hesum viðvíkjandi, upp til fleiri ferðir, bert í hesum eina málinum, uttan at endalig støða enn er tikin. Nærverkið hevur ongan byggitekniska førleika, hevur ikki førleika at gera kostnaðarmetingar ella at fremja verkætlanir av byggifrøðiligum slag. Hesin førleiki liggur hjá Landverk.

Tá tað snýr seg um leiklutin hjá Nærverkinum í hesum málinum so sæst av málsgongdini, at Nærverkið hevur verið áhaldandi í málinum bæði viðvíkjandi leigumálinum og eisini eftirfylgjandi, við keypið av húsunum, fyri at fáa málið framt, soleiðis at endamálið við at økja um tilboðið til autistar kundi røkkast.

Tað gongur týðiliga fram, at Nærverkið verður nýtt sum millumgongulið hjá bæði Almanna- og heilsumálaráðnum og Landsverk. Aðalráðið við at venda sær til Nærverkið við rykkjarum og ábreiðslum og Landsverk við at nýta Nærverkið, mest sum, sum eitt slag av sekretariati. Nærverkið hevur í hesi tilgongdini kent, at ábyrgdin fyri øllum málinum, í alt ov stóran mun, og av órøttum hevur verið plaserað á stovninum, havandi í huga, at Nærverkið ikki hevur heimild at taka endaligar avgerðir ella seta nakað í gongd. Men hevur verið bundið at Landsverk og aðalráðnum.

Í mun til leiklutin hjá Landsverk sæst somuleiðis týðiliga, at Landsverk við síni serfrøði, ongantíð fer rættiliga inn í málið, tekur tað til sín ella stýrir gongdini, sum ætlað. Tað skal skumpast undir alla tíðina. Landsverk tryggjar sær m.a. ikki neyðuga góðkenning hjá Almanna- og heilsumálaráðnum, tá teir fara undir at arbeiða við eini varandi loysn og harvið, í fyrstu atløgu, forrverra standin í húsinum í mun til møguleikan við bíligaru fyribilsloysnini. Eftir hetta verður fleiri

ferðir nærkast trupulleikanum, men ongin endalig støða verður nakrantíð veruliga tikin. Landsverk tryggjar sær ikki eina áhaldandi gongd í málinum m.a. við at fáa tilvega tilfar til støðutakan, so avgerðir kunnu verða tiknar í aðalráðnum.

Um leiklutin hjá aðalráðnum er at siga, at tað hava verið fleiri fundir um málið og nærum hvørja ferð, hevur niðurstøðan verið, at nýtt tilmæli skal gerast. Seinast fundur var um málið primo 2009, varð semja um at fara aftur til upprunauppskotið til varandi loysn, sum jú fyrilá longu á heysti í 2007 og sum Nærverkið mælti til í mai 2008 t.v.s fyri einum ári síðani. So avgerðargongdin hevur eisini verið út av lagi í hesum máli.

Spurningurin er, hví so illa hevur gingist í hond. Nærverkið ivast ikki í, at svarið skal finnast í tí leisti, sum er galdandi, tá tað snýr seg um útvegan av ognum og fremjan av íløgum hjá landinum. Tað er í dag ein trýpartaleistur, har hvør partur hevur sín leiklut. Tveir av pørtunum hava heimildir at taka avgerðir og útvega játtan og halda útreiðslur. Triði parturin hevur ráðgevandi og tilmælandi leiklutin, og ongar heimildir.

Í hesum málinum er tyngdin og kravið í stóran mun løgd á tann partin, sum ongar heimildir hevur at taka avgerðir og sum onga játtan hevur at fremja nakað í verki við. Fokusið er tí púra skeivt alla tíðina. Trýstið viðvíkjandi at loysa málið átti sjálvsagt at ligið á tí parti, sum kann taka avgerðir og sum hevur ábyrgd av at fremja ætlanirnar í verki. Alt annað førir ikki á mál.

Tað er alneyðugt at endurskoða hesa skipan, so slíkt ikki kemur fyri aftur. Í Nærverkinum óttast vit fyri nýggjum málum, har trýpartaleisturin aftur skal verða nýttur. Tí hann hevur víst seg ikki at virka.

Nærverkið ynskir ikki, orsakað av slíkum málum, aftur at koma í líknandi støðu, sum stovnurin er í nú, har Nærverkið, óskiljandi og av órøttum er drigið gjøgnum almennu fjølmiðlamylluna til stóran skaða fyri umdømið hjá Nærverkinum.

Vinarliga

Mary J. í Garði (sign.)
stjóri

# 10 Skjal 5: Frágreiðing frá Almannamálaráðnum til løgmann 26. mars 2009

Løgmansskrivstovan
Tinganes
100 Tórshavn

*Stílað Harra Kaj Leo Johannesen, løgmanni*

**Frágreiðing um Kelduskákið – heim fyri autistar í Klaksvík**

Mikudagin 3. mars varð landsstýriskvinnan í almannamálum biðin um at greiða frá málsgongdini í sambandi við keyp og umvæling av húsi til persónar við bústaðar- og umlættingartørvi í Klaksvík – í mannamunni rópt autistaheimið Kelduskákið.

/. Frágreiðingin lýsir í stuttum málið soleiðis, sum tað framgongur í skjølum í Almannamálaráðnum, fyrr Almanna- og heilsumálaráðnum (AHR). Stjórin í Nærverk, Mary í Garði, hevur tann 5. mars 2009 latið Almannamálaráðnum eina gjølla frágreiðing um leiklutin hjá Nærverk í málinum (sí hjálagt), og sipað verður eisini til hesa frágreiðing.

Innleiðandi skal gerast greitt, at í sambandi við keyp av húsum er tað stjórnarráðið, sum tekur støðu til húsakeyp, og er sum keypari eisini eigari av húsunum. Landsverk skal sýna og meta um ognina. Í hesum føri hevur tað verið Nærverk, ið leitar upp møguleikarnar, men Nærverk hevur ongar heimildir at taka avgerð ella keypa.

Forsøgan er í stuttum tann, at Nærverk í nøkur á hevur leigað eini hús frá Klaksvíkar kommunu til umlætting til fólk við autismu. Av tí at Klaksvíkar kommuna fleiri ferðir hevði borið fram ynski um at siga leigusáttmálan upp, tí húsini skuldu seljast, fór Nærverk í 2006 undir at leita eftir nýggjum egnaðum húsum til endamálið. Í fyrstu atløgu varð leitað eftir húsum at leiga.

Nakað av óformligum samskifti er ímillum Nærverk og AHR fyrst í 2007, um at leiga eini stór, ikki liðugtgjørd, hús, sum kunnu gerast vælegnaði til endamálið. Í telduposti til aðalstjóran í AHR tann 1. februar 2007 boðar Nærverk frá, at kostnaðurin fyri liðugtgerð og umbygging av húsinum er 2,1 mió. krónur. Landsstýrismaðurin svarar sama dag, og ynskir fleiri upplýsingar um leigumálið, so støða kann takast.

Í frágreiðingini frá Nærverk framgongur, at persónur frá Landsverk tann 16. februar 2007 sýnar húsini og ger ta niðurstøðu, at liðugtgerð og umbygging av húsinum, kostar 2,3 mió. krónur, íroknað lyft.

Fram til miðjan mars 2007 arbeiðir Nærverk miðvíst við, at fáa til vega ein langtíðarleigusáttmála við eigaran av húsinum, men verður hendan ætlan slept. Tann 14. mars mælir Nærverk til at húsini í staðin verða keypt, við hesum grundgevingum:

- Húsini kunnu verða innrættaði eftir tørvinum.
- Talan er um eina varandi loys.
- Talan er uppá longri sikt um eina bíligari loysn.

Tann 24. apríl 2007 boðar AHR í skrivi Nærverk frá, at landsstýrismaðurin hevur tikið undir við ætlanunum um at keypa húsini, treytað av, at eykajáttan frá mai 2007 varð samtykt í verandi líki. Eisini varð teimum boðað frá, at í eykajáttanaruppskotinum vórðu 1 mió. krónur settar av til liðugtgerð og umbygging í 2007, og at neyðugt var við 1,3 mió. krónum í 2008 til at gera húsini liðug.

Soleiðis fer málið til Fíggjarmálaráðið og oman í Løgtingið, sum tann 1. juni 2007 samtykkir eykajáttanarlógina uttan broytingar.

./. Síðst í juni vendir AHR sær til Landsverk og boðar frá, at eykajáttanin er samtykt og hvussu peningurin skal nýtast (sí hjálagt). Gott 5 mió. fara til keyp av húsinum og restin skal nýtast til umvæling av ognini í inniverandi ári. Nærverk fær avrit av skrivinum.

Húsini verða keypt og eru tinglýst 12. juli í 2007. 1. november 2007 heitir AHR á Trivnaðartænastuna um at fara í gongd við umvælingarnar beinanvegin, tí so langt er útliðið. Sambært frágreiðingini frá Nærverk arbeiða Trivnaðartænastan, Landsverk og Fuglø Arkitektar í november 2007 við at gera uppskot til innrætting. Nakað av umrøðu og iva stendst av kostnaðarmetingini. Fuglø Arkitektar tekna og Trivnaðartænastan, sum skal brúka húsini, ráðgevur um tørvin.

Sambært frágreiðingini frá Nærverk fremur Landsverk broytingar í húsunum í desember 2007, uttan at boða stjórnarráðnum frá. Arbeiðið fevnir um m.a. um niðurrívan inni og at gólvini verða tikin upp. Tað vísir seg seinni, at hesar broytingar eru partur av nýggjari og meira umfatandi innrættingarætlan.

Um miðjan mars 2008 fær AHR eina nýggja kostnaðarmeting frá Landsverki, sum sigur at kostnaðurin fyri umvæling verður 6,28 mió. krónur u/mvg, ella næstan trífaldað so kostnaðarmikið sum upprunaliga metingin. Hetta kemur óvart á fyrisitingina í AHR, tí stjórnarráðið hevur ongar ábendingar fingið um, at talan fór at verða um hægri kostnað enn tann, ið varð útvegaður við eykajáttan á vári 2007. Landsverk sigur, at nú, tá talan er um varandi loysn heldur enn fyribils – altso um keyp og ikki um leigu av húsinum – so er fortreytin broytt.

Hetta hevði fyrisitingin í AHR ilt við at skilja, tí annaðhvørt vóru hølini egnaði til virksemið ella vóru tey ikki, líkamikið hvørt talan var um leigumál ella keyp.

Tann 22. apríl kallar aðalstjórin í AHR Landsverk og Nærverk til fundar at umrøða málið. Aðalstjórin ger greitt, at støðan ikki er nøktandi, tí so lítil gongd er í málinum og at framvegis skuldi arbeiðast við upprunaligu ætlanini, sum varð mett at kosta 2,3 mió. krónur. Nærverk skrivar í frágreiðing sínari, at arbeiðið, sum Landsverk hevði gjørt í desember 2007, fór at dýrka ætlanina, tí bygningurin nú var í verri standi enn upprunaliga.

Avtalað verður, at Nærverk skuldi gera eitt tilmæli til Landsverk um møguligar loysnir. Tilmælið verður sent Landsverk tann 7. mai 2008, og AHR fær avrit av hesum.

Tann 16. september 2008 var fundur í AHR við tí endamáli at umrøða umbyggingina í síni heild og taka avgerð um, hvussu farið verður víðari í málinum. Niðurstøðan frá fundinum var, at ein bólkur mannaður við umboðum frá Landsverk og Nærverkinum

varð settur at endurskoða umbyggingarkostnaðin, at Landsverk var høvuðsábyrgdari í bólkinum, og at bólkurin skuldi koma við einari endurskoðaðari kostnaðarætlan í seinasta lagi ein mánað seinni.

Tann 6. november 2008 var fundur millum Landsverk og Almannamálaráðið, har Landsverk boðaði frá, at tekjan á húsinum lak illa og at ábøtur máttu fremjast beinanvegin. Landsverk metti, at umvælingin fór at kosta um 130.000 krónur, og Almannamálaráðið játtaði Landsverki at fara undir umvælingina.

Tann 30. januar 2009 var fundur millum landsstýriskvinnuna í almannamálum, landsstýriskvinnuna í innlendismálum, Landsverk og Nærverk um gongdina í málinum. Niðurstøðan av fundinum var, at farast skuldi aftur til uppskotið til varandi loysn. Hetta av fleiri orsøkum.

Fyri tað fyrsta meti eg ikki, at tað er ráðiligt at fremja eina fyribils umvæling, nú talan er um ogn hjá landinum. Eitt nú tekur ein fyribils loysn ikki hædd fyri, at brúkararnir gerast eldri og tyngri við árunum, og tí verður ikki neyðugt at gera umfatandi arbeiði í húsinum seinni, sum verður til stóran ampa fyri búfólkini. Í uppskotinum til varandi loysn fáa búfólkini eisini heilt aðrar baðirúmsfasilitetir, ið hóska betur til tørvin hjá fólki við autismu. Fyri tað næsta er tað ikki longur møguligt at fremja fyribils loysnina til metta kostnaðin, orsakað av niðurrívingini og upptøkuni av gólvinum.

Stjórnarráðið heitti á Landsverk og Nærverk um at endurskoða kostnaðarætlanina fyri at staðfesta, um umbyggingin kann gerast bíligari enn mett vísandi til, at byggivirksemið í samfelagnum annars er fallið munandi.

Tað seinasta sum er hent í málinum er, at Landsverk tann 2. mars 2009 er komið við uppskoti til innrætting. Tann 17. mars kom Landsverk við nýggjari kostnaðarmeting, sum segði, at arbeiðið kann gerast fyri 5 mió. krónur, undantikið leysafæ og innbúgv. Um farið verður í gongd beinanvegin, kann arbeiðið verða liðugt í inniverandi ári.

Rósa Samuelsen (sign.)
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen (sign.)
settur aðalstjóri

# 11 Skjal 6: Frágreiðing frá Landsverki til Almannamálaráðið 19. mai 2009

Almannamálaráðið
Eirargarður 2,
100 Tórshavn

**Viðvíkjandi autistahúsinum Kelduskákið í Klaksvík.**

Vísandi til frágreiðing frá Nærverkinum dagfest 05. mars 2009, j.nr. 200700224/51, hava vit hesar viðmerkingar:

1. Inngangur
Tá talan er um leigusáttmála, skal hesin góðkennast av Landsverki, sum ikki í aðrar mátar er partur av málinum. Her verður bert hugt eftir um prísurin samsvarar við tað ið leiga verður, og um myndugleikakrøv eru uppfyllt. Er talan um keyp, skal ognin kannast av Landsverki, sum síðani í samráð við Almannaráðið og brúkaran (Nærverkið) ger av, um ognin skal keypast.

2. Leigumál
Tað er ikki rætt, tá tað í frágreiðingin stendur, at 2,1 mió kr. skulu setast av til liðuggerð og umbygging. Kostnaðarmetingin, ið Fuglø Arkitektar gjørdu í sambandi við leigumálið, umfataði bert neyðugar ábøtur á húsini, soleiðis at tey kundu gerast nýtilig til endamálið í eitt stytri tíðarskeið (3-5 ár). Hugburðurin var: eitt leigumál til at liva við – fyribils.

Tað er heldur ikki rætt, tá tað í frágreiðingini verður ført fram, at dagførda kostnaðarmetingin 2,3 mió kr., ið varð grundað á eitt sýn tann 16.02.2007, var fyri liðuggerð og umbygging. Framvegis var hetta metti kostnaðurin fyri neyðugar ábøtur við einum stytri leigumálið fyri eygað. LV var ikki partur í keypinum, uttan við atlitið til myndugleikakrøv. LV var ikki biðið um, at meta um og metti ikki um, tað var skilabetri at leiga ella keypa. LV avgreiddi ikki keypið.

3. Keyp av húsinum
Tá avgerð í mars 2007 varð tikin um at keypa húsini, var einki projekt gjørt og harvið heldur eingin kostnaðarmeting út frá nýggju fortreytunum. Tað tók drúgva tíð at avgreiða keypið, og tí varð einki meira gjørt við málið fyrr enn í september 2007.

4. Umbygging
Tá keypið var endaliga avgreitt, varð farið undir at tillaga verkætlanina til broyttu umstøðurnar, tí nú var talan um eina varandi loysn, og at halda fast við upprunaligu lappaloysnina gav tí onga meining. Fuglø Arkitektar gjørdu hesar tillagingar í samráð við Trivnaðartænastuna hjá Nærverkinum. Við tað at tað gekst illa at fáa fyrrverandi eigaran út, slapst ikki inn í húsini fyrr enn um mánaðarskiftið nov/des, men fyrst í desember 2007 kundi niðurrívingararbeiðið loksins setast í gongd, men vegna nýval og væntandi fíggjarlóg steðgaði arbeiðið upp í január 2008.

Tá fíggjarlógin fyri 2008 varð samtykt, fekst at vita frá Almannamálaráðnum, at hóast húsini vóru keypt, var hugburðurin um fyribils ábøtur ikki broyttur. Hetta tók Landsverk til eftirtektar og fór í holt við at fremja ætlanini á hesum grundarlagi. Tað vísti seg tó skjótt, at sera torført var at finna eina loysn innan hesar karmar, sum í nóg stóran mun livdi upp til tey krøv, ið eru galdandi, og tí dróg málið út. Tó var gjørd ein roynd við so bíligari loysn sum møguligt, men hendan kom at kosta uml. 3,5 mió.,

uttan at Nærverkið var nøkt við loysnina. Tí varð gingið burtur aftur frá hesum, og ein varandi loysn verður nú projekterað, og arbeiðið verður væntandi boðið út áðrenn summarfrítíðina 2009.

5. Viðmerkingar
Pástandurin um, at Almanna- og heilsumálaráðið og Landsverk hava nýtt Nærverkið sum millumgongulið, má standa fyri teirra egnu rokning. Men at Landsverk hevur nýtt Nærverkið sum sekretariat, mugu vit staðiliga afturvísa. Nærverkið er brúkarin í hesi verkætlanini, og samskiftið millum Nærverkið og Landsverk hevur verið sum vanligt er millum brúkara og byggiharra. At málið hevur tikið so drúgva tíð, skyldast ikki passiviteti frá Landsverki, men heldur teir nógvu óvæntaðu trupulleikarnir, ið hava stungið seg upp í allari tilgongdini. Ikki minst kann nevnast, at tørvurin sum Nærverkið upplýsti fyri teimum projekterandi til endaliga loysn, samsvaraðu langt fra tí játtan sum fyrilág. Sostatt hevði Landsverk eina játtan tøka, sum ikki kundi liva upp til krøvini og tørvin sum Nærverkið setti. Í hesi støðu var ikki nógv annað at gera, enn at bíða inntil krøvinin slakaðu, ella játtanin hækkaði. Tó vóru bráfeingis ábøtur gjørdar á klimaskermin, soleiðis at bygningurin ikki skuldi farast. Nú er so valt at hækka játtanina. Var til dømis fari undir at byggja eftir fyribilsloysnini, sæst nú, eftir seinastu avgerð um at hækka játtanina, at øll íløgan hevði verðið burturspilt.

Í baksýni, hevur tað mest ørkymlandi fyri Landsverk verið ábyrgdarbýti millum Almannamálaráðið og Nærverki, tí ikki bar til at gera nakað sum var dýrari enn játtanin (Almannamálaráðið) og heldur ikki bar til at gera eina loysn, sum Nærverki (serkunnleikin) ikki metti var forsvarligur.

Vinarliga

Oyvindur Brimnes (sign.)

# 12 Skjal 7: Skriv frá Landsverki til Innlendismálaráðið 14. juli 2009

Innlendismálaráðið
Postboks 159
110 Tórshavn

**Viðmerkingar til fyrilbils frágreiðing hjá Landsgrannskoðaranum**

Vísandi til omanfyri nevndu frágreiðing hava vit fylgjandi viðmerkingar:

Viðmerkingarnar skulu síggjast í ljósinum av, at Landsverk metir, at leiklutur okkara í hesum máli ikki er rætt endurgivin.

Metingin av 2,3 mio. kr.:
Vísandi til s. 9 3. niðasta petti stendur: *"Talan er um eina ogn, ið Landsverk sýnaði í februar 2007. Almannaráðið keypti ognina. Keypspeningurin var 5 mió. kr. og umvælingar vóru mettar til 2,3 mió. kr."*. Hetta sitat er grundað á nakrar misskiljingar. Fyri tað fyrsta var ætlanin av fyrstan tíð at leiga bygningin, og í hesum sambandi varð ein kostnaðarmeting gjørd, við tí í hyggju at gera ávísar ábøtur, so mann kundi leiga bygningin í nøkur fá ár. Tí kann metingin frá februar 2007 ikki tengjast saman við tí, sum seinni hendi, nevniliga, at bygningurin bleiv keyptur. Her er altso talan um tvey ymisk viðurskifti. Metingin upp á 2,3 mió. kr. eigur Landsverk bara sín lítla leiklut í, tí Fuglø Arkitektar vóru rekvireraðir av Nærverkinum, høvdu mett 2,1, men tá var parkering og lyft ikki tikin við. Um parkering og lyft eisini skuldu koma afturat, varð neyðugt við 200 tkr. omaná, og er hetta Landsverks íkast til metingina.

Keyp av bygninginum:
At bygningurin var keyptur og ikki leigaður, eigur Landsverk ognan lut í. Landsstýrismaðurin hevur ikki fingið nakað tilmæli frá Landsverki, um at rætta loysnin var at keypa bygningin. Landsverk var yvirhøvur ikki spurt eftir, hóast vit høvdu ræðisrættin á játtanini. Landsverk var bara biðið um at rinda keypspeningin beinanvegin, og varð tað gjørt, tá sáttmálaskjøl fyrilógu. Hesin framferðarháttur tykist at vera sera løgin, tá talan er um, at ræðisrætturin á kontuni lá hjá stjóranum á Landsverki. At landsstýrismaðurin formelt keypir bygningin er sín sak, men ikki at draga stjóran á Landsverki inn í málið, er eftir okkara tykki sera løgið. Skoytast kann uppí, at Landsverk tí heldur ikki hevur mett, um keypsupphæddin upp á 5 mió. kr. var í lagi. Landsverk var biðið um viðmerkingar í samabandi við sjálvan keypssáttmálan, og hevði ongar viðmerkingar til hendan. Landsverk var ikki vitandi um, at húsið varð keypt fyrr enn ein uppringing kom frá advokatinum um, at keypsupphæddin skuldi rindast beinanvegin.

Metingin upp á 5,0 mió. kr í umvælingarkostnaði (s. 11 seinast pettið).:
Tá so bygningurin var keyptur, var støðan ein onnur, nú var talan um, at landið átti bygningin, og tí var mett, at tað var ikki rætt at halda fast við fyrr nevndu lappaloysn, men heldur at fáa eina varandi loysn ístaðin, tí tá vildi landið fingið meira fyri peningin. Fuglø Arkitektar gjørdu eina nýggja ætlan fyri bygningin saman við Nærverkinum, sum skuldi seta upp tørv og krøv. Tað er jú Nærverkið, sum eru serfrøðingar innan økið, tá hugsað verður um, hvør skal nýta bygningin. Landsverk metti ikki, at tað var nøkur grund at halda, at henda meting ikki var røtt, og hevur tí viðmælt hesa meting. Hendan nýggja ætlanin var gjørd út frá teimum nýggju fortreytunum, og kann tí ikki tengjast saman við fyrr nevndu meting upp á góðar 2,3 mió. kr., tí talan er, sum sagt frammanundan, um tvær heilt ymiskar loysnir. Tað tykist løgið, at Landsgrannskoðarin ikki skilir hesa grundgeving, tí við fyrru loysnini vildi

leigarin framvegis átt bygningin, og havt ágóðan av hesi umvæling – eisini eftir at leigumálið var útgingið. Fyrr nevnda loysn vildi verið ein lappaloysn og tí "burturspiltur peningur" upp á longri sikt, tí ynskti Nærverkið eina varandi loysn, nú bygningurin var keyptur og uppsetti tørv og krøv hareftir.

Sambært frágreiðingini s. 10 4. ovasta pettið, kom hetta óvart á Almanna- og Heilsumálaráðið, tí ráðið hevði ikki fingið nakra ábending um, at talan fór at vera um ein hægri kostnað enn tann, ið figging var til. Orsøkin til hetta er einkult tann, at Landsverk tók sum givið, at Nærverkið, sum er stovnur undir ráðnum, hevði samskift um hetta.

<u>Onki hendir:</u>
Orsøkin til, at Landsverk ikki hevur arbeitt víðari við verkætlanini er, at samsvar hevur ikki verið millum játtanin frá Almannamálráðnum og krøv og tørv frá Nærverkinum, og at ongin kundi taka støðu til, hvat skuldi gerast.

<u>Niðurrívingin:</u>
Grundin til at Landsverk fór í holt við at ríva niður var, at ligið var so langt út á árið, áðrenn sleppast kundi framat bygninginum, og sum kunnugt, er umráðandi, hvørki at nýta ov nógv ella ov lítið av játtanum. Landsverk tók tað sum givið, at Nærverkið hevði konfirmerað tørv og krøv við Almannamálráðnum. Eftirfylgjandi kann staðfestast, at hetta var ikki so. Henda niðurríving fer tó ikki at dýrka um samlaðu verkætlanina, nú avgerð er tikin um at renovera bygningin.

<u>Samanumtikið:</u>
Tað hava sostatt verið tvær ymiskar loysnir inni í myndini, nevniliga

1) at leiga við einari ávísari minimum umvæling í avmarkað tíðarskeið: Metingin upp á 2,3 mió. kr. skal síggjast í ljósinum av hesum.
2) Seinni varð húsið keypt, og stavar seinna kostnaðarmetingin frá tørvslýsingini hjá Nærverkinum, har tikið er atlit til eina langtíðar- og varandi loysn.

Hesar báðar loysnirnar eru ikki komnar nóg væl fram í frágreiðingini.

Eftir okkara tykki, hevði tað verið meira upp á sítt pláss at konsentrera seg um, um tað er tann rætta loysnin og nakað fingið fyri pengarnar, sum er brúktur, heldur enn at flyta ábyrgd. Í verandi løtu sær út til, at valda loysnin er á góðari leið. Tá talan er um slíka bygging, er vanligt, at $m^2$-prísurin er umleið 20.000 kr., og tað verður hann eisini við hesi loysnini, har Landið hevur fingið ein bygning upp á 527 $m^2$ fyri umleið 10,0 mió. kr., tá arbeiðið er liðugt. Hinvegin hevði tað verið ein vánalig loysn at umbygt eftir fyribilsloysnini, sjálvt um hon var bíðligari, og kundi tá við røttum verið tosað um, at peningur var nýttur, og ov lítil nytta var fingin fyri peningin.

Samanum tikið sær út til, at landið fær eina hóskandi loysn til rætta prísin, meðan øll kunnu vera samd um, at hetta hevur tikið alt ov langa tíð.

Oyvindur Brimnes (sign.)